# Sambýlið Bárðarfløttur – Samandráttur frá eftirlitinum

Sambýlið á Bárðarfløtti í Vági, er sambýlið undir Almannaverkinum við fimm húsfólkum í aldrinum 37–66 ár. Talan er um fólk við menningartarni og í summum førum eisini sálarligum avbjóðingum. Húsini eru upprunaliga eini sethús, sum í 1996 vóru bygd um til endamálið. Húsfólkini hava hvør sítt kamar, sum tey við hjálp frá starvsfólkunum, hava innrættað eftir egnum tykki. Trý av húsfólkunum hava egið baðirúm, meðan tvey deila eitt baðirúm. Køkur/stova og vaskirúm eru felagshølir.

Gerandisdagurin á Bárðarfløtti líkist einum vanligum degi, við arbeiði, frítíð og felagsskapi.

**Trivnaður og menning hjá borgarunum**
Húsfólkini trívast sum heild væl. Starvsfólk og leiðsla leggja dent á tryggleika, viðurkenning og at hoyra og virða hvønn einstakan. Avvarðandi vísa á góðan trivnað, men ynskja regluligar statusfundir, fleiri og meira skipaði felags tiltøk og møguleikar fyri luttøku uttan fyri húsið. Húsfundir eru til tíðir, men tað kann vera langt ímillum fundirnar. Víst verður á, at flutningsmøguleikar avmarka í ein ávísan mun luttøku hjá teimum, sum brúka koyristól ella rollator.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkum**
Starvsfólkabólkurin er sera støðugur og samstarvið er gott. Øll hava verið á KRAP-skeiði, og faklig sparring er tøk frá leiðaranum. Ætlanir eru gjørdar um supervisión. Eftirlitið spyr, um ein ergoterapeutur ella starvsfólk við heilsufakligum førleika kundi styrkt toymið, serliga nú húsfólkini gerast eldri og tørvurin er fjøltáttaður.

**Ætlan og virkisætlan**
Kontaktpersónarnir leggja ætlanir saman við húsfólkunum, og hesar ætlanir verða lagdar fram á starvsfólkafundi. Virkisætlanir verða eftirmettar og tillagaðar, men arbeiðið kann gerast meira einsháttað og skipað. Avvarðandi hava ikki innlit í virkisætlanirnar og mælt verður til betri samskifti og fastan leist fyri dagfestingar, eftirmetingar og skrásetingar.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðslagið er fakliga grundað á KRAP og Low Arousal; Boardmaker og sokratiskur spyrjiháttur verða nýtt sum amboð. Eftirlitið mælir til, at styrkja skjalprógvanina (KRAP-skjøl, ferðsluljós o.t.) og at hesi verða løgd inn í Skjalfest. Eisini verður mælt til dagsskráir hjá teimum, sum ikki fara til arbeiðis, og at gera skipað felags virksemi í eina fasta legu. Flutningsviðurskifti eiga at verða loyst, til dømis við egnum bussi ella føstum lánsskipanum, so øll kunnu luttaka á jøvnum føti á túrum og tiltøkum.

**Organisatión og leiðsla**
Ábyrgdarbýtið millum leiðslu og starvsfólk er greitt, álitsviðurskiftini eru góð og leiðslan er nærverandi. Starvsfólkini kenna seg hoyrd og stuðlað. Mælt verður til, at avgerandi skjøl, t.d. um kontaktpersónsleiklutin, verða send til Eftirlitið, tá eftirlit vera framd, og at regluligar MUS/TUS samrøður verða umhugsaðar, fyri at varðveita og menna eitt framúr gott arbeiðsumhvørvi.

**Tilmælir og áheitanir frá Eftirlitinum**

Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til, at Almannaverkið vísir meira nærlagni, tá ið skjøl verða send Námsfrøðiliga eftirlitinum, t.d. tá ið talan er um virkisætlanir, og at ætlanirnar eru dagfestar.*

*Mælt verður til, at leiðari og starvsfólk gjøgnumganga skjølini av nýggjum (og skriva tey á føroyskum), soleiðis at t.d. starvslesandi kunnu fáa eitt samlað skjal um tilboðið; somuleiðis má vera hent hjá eindarleiðara og øðrum fyrisitingarligum starvsfólki hjá Almannaverkinum, at kunna lesa hesi skjøl. Í verandi løtu vísa skjølini í ymiskar ættir. Harafturat eru týðulig ósambæri millum tað, sum stendur í skjølunum og tað, sum varð sagt í samrøðuni við starvsfólk og leiðara.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Allar virkisætlanir verða dagførdar og gjørdar eftir leistum fyri virkisætlanir í "Skjalfest". Talan er um: mannagongdsfrymil, lutmálsfrymil og ferðsluljósskjal. Onnur viðkomandi skjøl verða eisini dagførd, tíðar/dagfest og skriva á føroyskum.

*Mælt verður til at hava ein fund um árið millum kontaktfólk og avvarðandi, og at húsfólkið er við, um hetta hóskar seg.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Frameftir verður innkallað til árligan eftirmetingarfund við avvarðandi hjá hvørjum einstøkum borgara, saman við kontaktpersónum á Verkstaðnum á Bakka og húsfólkum, í teimum førum tað er gjørligt.

*Mælt verður til, at týðiliga verður boðað frá um felagsvirksemi t.d. spøl fyri øllum húsfólkum. Møguliga skal felagsvirksemi verða sett á vikuskránna.*

> **Almannaverkið viðmerkir**
> Kunning um felagsvirksemi fer at koma uppá vikutalvuna, sum hongur á vegginum í felagshølunum, afturat dagliga samskiftinum um evni millum hús- og starvsfólk.
>
> Tá ið tiltøk verða fyriskipaði lokalt í oynni, skipa starvsfólkini fyri luttøku, í tann mun tað letur seg gera, innanfyri givnar karmar. Tiltøk í húsinum verða altíð kunnaði um á degnum ella upp til dagin, alt eftir sinnisføri og aktuella dagsforminum hjá einstøku húsfólkunum.

*Mælt verður til at ynski um racerunning hjá ávísum húsfólki, verður viðgjørt á fundi millum húsfólkið, starvsfólk, leiðara og avvarðandi. Um Bárðrarfløttur ikki kann veita neyðuga hjálp til hetta, so verður mælt til, at leiðarin á Bárðrarfløtti vísir á, um tað eru aðrar skipanir, sum kunnu lofta hesum ynskinum, ella grundgeva á fyrisitingarligan rættan hátt, um hví tað ikki letur seg gera.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Kontaktfólkini hava havt fund við húsfólkið um áhugan fyri racerunning. Farið verður nú undir at kanna, hvar racerunning kann vera.

*Mælt verður til, at leiðari og eindarleiðari veruliga umhugsa, um man eigur at fáa aðrar fakbólkar inn. Eftirlitsfólkið tekur ikki støðu til, um tað kann vera ergoterapeutur ella heilsustarvsfólk. Men tað sæst allastaðni, at samansetingin av avbjóðingunum er ovurstór, av tí at avbjóðingarnar hjá húsfólkunum eru sera blandaðar, og at húsfólkini gerast eldri og eldri.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Eftirsum flestu starvsfólk hava námsfrøðiliga útbúgving, hava tey fakligan førleika til at veita grundleggjandi námsfrøðiligt tilboð. Tá neyðugt er við serkunnleika, so sum ergo- ella fysioterapi, verður tað keypt uttanífrá. Hetta merkir, at borgarar, sum hava tørv á hesum, keypa sær hesa tænastu, við ávísing frá lækna og eftirfylgjandi tilskot frá heilsutrygd, eins og øll onnur.

Mett verður at tørvurin á ergoterapi til tey fimm húsfólkini er ov lítil, til at verða grundarlag undir at seta ein ergoterapeut í starv við teirri normering, sambýlið hevur. Til kunningar kann sigast, at vit harafturat fáa ergo- og fysioterapeutiska ráðgeving frá eindini "hjálpartól", tá vit biðja um tað, og tað er neyðugt.

Í sambandi við illgruna um demens, hava vit samskift við psykiatriska depilin, demenstoymið, sum hava hjálpt við at deila sína vitan um sjúkuna. Viðvíkjandi skerdum førleikum orsaka av serligum diagnosum, mugu vit leita eftir vitan so hvørt, sum vit møta hesum hjá okkara borgarum.

Vaktirnar verða umlagdar um neyðugt, t.d. soleiðis, at tvey fólk eru til arbeiðis í senn um morgunin, heldur enn ein. Talan er ikki um eina uppnormering av sambýlinum, men eina umlegging av arbeiðstíðunum, soleiðis at tað betur hóskar til aktuella tørvin.

*Mælt verður til, at avvarðandi verða kunnaði um virkisætlanir.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Í sambandi við árliga eftirmetingarfundin við avvarðandi, sum nú verður settur á skrá, koma virkisætlanir og menningarmál á skrá.

*Mælt verður til at nýta dagsskráir; serliga til húsfólk, ið ikki fara til arbeiðis á varda verkstaðnum.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Tað er sera trupult at gera dagsskrá, sum kann realiserast, við húsfólk á sambýlinum, sum ikki eru til arbeiðis í vardum starvi. Tað er altíð dagsformurin, ið

samstundis er orsøkin til, at húsfólk ikki longur hava førleika at luttaka í starvinum, ið avgerð, hvat dagsskráin kann verða. Dagsskráin kemur tí at verða ein daglig meting um skránna fyri dagin, heldur enn ein dagsskrá yvir tíð.

*Mælt verður til at fáa buss tilboðið, ella gera regluliga skipan við láni av bussinum hjá Verkstaðnum á Bakka, soleiðis at húsfólk, ið eru í koyristóli ella brúka rollator, ikki eru fyri mismuni, tá ið talan er um biltúrar.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Bárðarfløttur hevur altíð møguleika at brúka bussin sum er staðsettur á Verkstaðnum á Bakka eftir tørvi, eftir kl.16 gerandisdagar, alt vikuskifti og halgidagar. Tó er kortini ynskiligt at persónbilurin verður skiftur út við ein buss.

*Mælt verður til, at samstarvið millum Verkstaðið á Bakka og Bárðarfløtt gerst neyvari, tá ið talan er um tey húsfólkini, sum eru á báðum støðum.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Ætlanin er at hava ein árligan felagsfund ímillum starvsfólkini á báðum tilboðunum, til eftirmeting um sínámillum samstarv og samstarv við borgararnar, við tí endamálið, at betri samsvar verður ímillum persónligar virkisætlanir á arbeiðsplássinum og bústaðnum.

*Mælt verður Almannaverkinum til, at skjøl í sambandi við KRAP og ferðsluljósskrásetingar verða løgd inn á Skjalfest. Somuleiðis heldur eftirlitsfólkið, at starvsfólk og leiðari skulu nýta ferðsluljósskrásetingarnar neyvari.*

**Almannaverkið**
Tað er í dag ikki møguligt at koma beinleiðis til og útfylla KRAP skjøl í Skjalfest. Ynski er, at tað fer at lata seg gera. Tað fer at krevja víðkan av møguleikum í Skjalfest. Ferðsluljósskrásetingar finnast longu undir “virkisætlanir” í Skjalfest. Tær verða útfyltar neyvari frameftir, soleiðis at t.d. nýggj starvsfólk og starvslesandi fáa lættari atgongd til skjølini og at seta seg inn í námsfrøðilig amboð, sum verða nýtt á sambýlinum.

*Mælt verður til, at avgerandi skjøl, t.d. skjalið um kontaktpersónsleiklutin, verða send til námsfrøðiliga eftirlitið.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Skjalið verður sent eftirlitinum.

*Mælt verður leiðaranum til at umhugsa, um tørvur er á árligum MUS ella TUS samrøðum, ella øðrum slag av árligum samrøðum.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at halda MUS-samrøður.

*Eingin áheitan verður givin.*